## Føroya stuttligasta borðhald

**Stuttligasta borðhaldið í landinum verður aftur í ár á Hotel Vágum**

SKEMT
*tíðindaskriv*

Fyri einum ári síðan varð skemtarin Hilmar Jan Hansen kosin Føroya stuttligasti, tá FS Vágar á fyri fyrstu ferð skipaði fyri Føroya stuttligasta borðhaldi. Gott og væl 1.200 fólk vóru komin saman í høllini á Giljanesi, sum var pyntað og prídd til hetta fyrsta tiltaki av sínum slag í Føroyum, og sigast má, at uppmøtta fjøldin fekk mýkt sær búkvøddarnar.

So væl eydnaðist tiltakið í fjør, at fyrireikararnir hava sett sær fyri at endurtaka tað, og leygardagin 2. september verður Føroya stuttligasta borðhald aftur í høllini á Giljanesi.

Tiltakið í ár byggir á tiltakið í fjør, men fyrireikararnir hava gjørt nakrar broytingar, sum ætlandi skulu gera tiltakið enn betur.

Ein broyting er, at í ár vera tveir skemtarar úr hvørjum øki í landinum á pallinum í senn. Eins og í fjør verður felagssangur undir borðhaldinum, men í ár fer eisini Martin Joensen Band at undirhalda við góðum tónleiki.

Tað verður Hans Hjalti Skaale úr Klaksvík, sum í fjør var millum skemtararnar, ið skal halda skil á tí, sum fer fram á pallinum, og verður tað eisini hann sum skal standa fyri felagssanginum.

Eins og í fjør verður aftan á borðhaldið skipað fyri dansi, og í ár verður góður countrydansur at dansa til.

Tað verður ókeypis at koyra undir Vestmannasundi og Leirvíksfirði hetta vikuskiftið. Tí er lagamanni hjá øllum at ferðast undir sundini, og av somu orsøk verður ikki skipað fyri bussambandi í sambandi við tiltakið í ár.

# Kundi eins væl kostað mannalív

**Ein full gassfløska mundi endað í ovninum hjá IRF í gjár. Skaðin hevði verið stórur, um fløskan sprongdist. Poul Andrias Joensen, stjóri hjá IRF ásannar, at nakað má gerast við trygdina.**

UMHVØRVI
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Um tíggjutíðina gjáramorgunin, varð ein gassfløska funnin í køstinum á brennistøðini hjá IRF í Leirvík.

Vakthavandi sá okkurt runt í grabbanum, beint áðrenn hann skuldi tømast í ovnin og valdi at taka hann niður aftur, fyri at hyggja hvat hetta var.

- Tað var reint held, at hann hugdi, og fekk steðga fløskuni, sigur Poul Andrias Joensen, stjóri hjá IRF.

- Um fløskan var farin niður í hitan í ovninum, hevði hon eksploderað, og ovnurin hevði farið í knús, greiðir hann frá.

Hvat fylgjurnar høvdu verið, kann Poul Andrias Joensen bara gita seg til.

Vanliga er eitt undirtrýst inni í ovninum, men ein tílík spreinging hevði gjørt eitt yvirtrýst, og høllin hevði blivið til eitt eldhav. Tað hevði verið stórur vandi fyri tey starvsfólk, ið vóru stødd inni í høllini.

– Tey høvdu í minsta lagi fingið stóran brandskaða, og í ringasta føri hevði ein tílík hending kostað mannalív, sigur Poul Andrias Joensen.

### Ómøguligt at spora

Fløskan var ein aluminium gassfløska við 26,2 litrum av propangassi. Hetta er ein heilt vanlig gassfløska, ið kann keypast í matvøruhandlum og verður nýtt í kampingvognum ella á tjaldingarplássum.

Gassfløskan er merkt við nummari, men hóast hetta er tað ómøguligt at spora hvaðani fløskan er komin. Tí fløskan er av tí slagnum, sum Føroya Gassøla selur til vanligar handlar, ið ikki skráseta hvør keypur tær. Av tí sama hevur IRF ongan møguleika at fara víðari við málinum.

Men hvussu kann tað koma so vítt, at ein gassfløska kann koma allan vegin ígjøgnum skipanina hjá IRF, uttan at nakar leggur merki til hana?

- Eg vænti ikki, at tað er komið frá einum mannaðum bingjuplássi, tí tey høvdu nokk lagt merki til tað, men tað kann sjálvandi ikki útilukkast. Vit tøma eisini bingjur frá virkjum og privatfólki og tað er púra hopileyst at kanna, hvat verður latið í tær bingjurnar.

- Vandi er eisini á teimum ómannaðu bingjuplássunum. Har er einasti møguleiki vit hava, at halda eyguni opin tá vit tøma bingjunar. Men bingjurnar eru ofta 10 rúmmetur, og tá kann vera ringt at bera eyga við eina 26 litur fløsku.

### Økja trygdina

Hjá IRF royna tey at finna onkran máta at økja trygdina uppá. Millum annað hava tey viðmælt øllum kommununum at halda bingjuplássini læst, og at hava tey mannað tá opið er. Eisini hava tey hildið skeið fyri fólkinum, ið er á bingjuplássunum, um hvussu ruskið skal skiljast.

Men Poul Andrias Joensen sær væl, at hetta ikki er nóg mikið.



*Tað var bert hepni, at henda gassfløska ikki endaði í brenniovninum hjá IRF í gjár.*
*Mynd: Ingvard Fjallstein*

– Fyrr í ár sprongdist ein trýstfløska í ovninum, og gjørdi stóran skaða. Síðan tað hava vit økt upplýsingina, millum annað á heimasíðuni. Men nú tað hendir aftur, er tað púra greitt, at her má okkurt gerast. Vit ætla skjótast gjørligt at finna útav, hvat kann gerast fyri at betra trygdina.

# Kundi eisini hent á brennistøðini í Havn

**Vandin fyri at fáa gassfløskur í ovnin á brennistøðini í Havn er eins stórur, og hann er hjá IRF.**

UMHVØRVI
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Bárður Mikkelsen, leiðari á brennistøðini á Hjalla, sigur, at einasti møguleiki hjá teimum at verja seg ímóti, at trýstfløskur koma í ovnin, er, at tann sum situr á vakt, hyggur væl eftir.

Bárður Mikkelsen sigur, at tey gera alt tey kunnu fyri at verja seg fyri trýstfløskum, serliga við at upplýsa fólk um, at tílíkar fløskur ikki skulu brennast. Men brennistøðin hevur ongan møgulleika fyri at hava eftirlit við, hvat fólk kastar burtur.

Ein møgulig loysn uppá trupulleikan, sigur Bárður Mikkelsen, er ein knúsari, har alt burturkastið skal ígjøgnum. Endamálið við einum tílíkum knúsara hevði verið at fingið betri og smærri burturkast, men ein fyrimunur við honum hevði eisini verið, at gassfløskur høvdu blivið steðgaðar, áðrenn tær náddu í ovnin.

Enn er ikki avgjørt, um brennistøðin keypur ein tílíkan knúsara.